HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

# LABORANTUR
# til kemisku kanningarstovuna

## Starvslýsing
Fyri laborant í barnsburðarfarloyvi søkja vit eftir laboranti at byrja mánadagin 16. august 2010 ella eftir avtalu. Starvið er inntil 31. mars 2011.

Starvið fevnir um kemiskar kanningar innan matvøru- og umhvørvisøkið. Serliga er talan um kanningar av matvørum, drekkivatni, spillivatni, svimjihylsvatni og jørð. Starvið fevnir eisini um sýnistøku innan virkisøkið hjá deildini. Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum.

Fleiri upplýsingar síggjast á www.hfs.fo.

## Útbúgving og royndir
Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur.

Tað er ein fyrimunur at hava royndir innan kemiskt kanningarstovuarbeiði og at hava kunnleika til góðskustýring og EDV á brúkarastøði. Somuleiðis er tað ein fyrimunur at hava koyrikort.

Tú skalt duga føroyskt og/ella eitt norðurlendskt mál.

Tú skalt hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

## Tíð og setanarviðurskifti
Starvið er fulla tíð, ella eftir avtalu.

Lønin verður í 4. flokki sambært sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum, sí sáttmála og lønartalvu á heimasíðuni hjá Lønardeildini, www.lnd.fo.

## Umsóknin
Umsóknir til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 9. juli 2010.

## Um kemisku kanningarstovuna
Í løtuni eru 5 laborantar og ein akademikari í føstum starvi.

Kanningarstovan er altjóða góðkend eftir DS/EN ISO/IEC 17025 og er undir eftirliti av DANAK (Dansk akkreditering), sí www.danak.dk.

Kanningarstovan er ein vælvirkandi deild, har starvsfólki dagliga strembar eftir dygdargóðum avriki og einum góðum arbeiðsumhvørvi.


Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 556 400**
Fax. **+298 556 401**
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Rikke Berg Larsen, deildarleiðara, tel 55 64 00, ella á www.hfs.fo.